# t velja?



*Demokrati ber fyrst og fremst í sær, at avgerðir verða tiknar eftir kjak, upplýsing og alment innlit*

t.d. í Sveits og manga staðni í Amerika.

Tey flestu, sum lesa hetta, eru helst ímóti. Kanningar vísa, at flestu fólk halda seg duga væl betur enn miðal at koyra bil - og hvat sigur tað ikki nógv um lívið? Á sama hátt munnu tey flestu halda seg vera politiskt skilabetri enn miðal og eru tí ivasom at lata ta býttu fjøldina fáa ov nógv vald. Men sama fjøld velur longu tingfólkið, sama fjøld skal keypa rundstykkini og manna bakaríir og kioskir - álvaratos, um fólk ikki klára at taka støðu til, hvørt smáhandlar skulu vera afturlatnir millum 10 og 14 sunnudag, so er ikki nógv gott væntandi frá fjøldini.

Onnur mál, sum kundu farið fyri fólkið eru mál um størri íløgur. Vilja vit fara undir tunnil til Suðriar ella nýggjan flogvøll? Hetta eru týðandi, men eisini dýrar íløgur, sum kanska ikki kunnu gjaldast við brúksgjaldi einans. Tingflokkar allir fara neyvan at semjast innanhýsis, og tó (ella kanska júst tí) at hesar íløgurnar eru sera dýrar, so ber væl til hjá vanliga skattgjaldaranum at taka støðu til, hvørt hann vil vera við at gjalda fyri tær. Hjá kommunum eru somuleiðis mangir spurningar, sum nógv betur liggja hjá fólkinum øllum enn hjá fólksins fultrúum.

Eisini spurningar, um hvørji virði og siðir skulu vera tey hjá almennu Føroyum, kunnu fara til fólkaatkvøðu. Moralskar tvístøður, til dømis hvørt samkynd ella fleiri enn tvey kunnu giftast (ella á annan hátt serliga viðurkennast), býta sundur fólk tvørt av flokstilknýti og politikki annars. Hevði fólkið tikið støðu annan vegin til slíkar spurningar, so kundu tingmenn síðani smíða og samtykt lóggávuna annars. So slapst eisini undan, at slíkir spurningar tóku óproportionalt pláss uppundir løgtingsval.

Eyðvitað kunnu so mangir spurningar, eisini týðandi nýskipanir av ríkisstøðuni fara til fólkið til støðutakan. Undir øllum umstøðum hevði fólkaatkvøða birt alment kjak av heilt øðrum slagi, enn vit í dag uppliva tað. Fleiri høvdu ómakað sær at gjørt vart við hugsan sína, og áhugin fyri málunum manna millum var eyðvitað størri, um tað vóru fólk og ikki bert fólkavald, sum tóku støðu til summi mál.

Kann vera, at næstu ferð vit hoyra formannin í valstýrinum spyrja, um nakar er eftir, sum vil á val, hava vit sjálvi tikið støðu til onkra lóg - og ikki bara breyðpolitikarar.

# Kjaktingið í Vágsbotni

**TINGHELLU-KLUMMAN**
*Kári á Rógvi*

Fyri stuttum lat miðlahúsið hjá Sosialinum upp í Vágsbotni í Havn, har handilsvinna hevur verið síðani Ryberg var á døgum.

Fremsta eldsálin aftan fyri ný- og umskapanina av Sosialinum er ábyrgdarblaðstjórin Jan Müller. Jan las í ungu døgum sínum fornaldarfrøði, og sum fornaldarfrøðingur veit Jan nógv um viðurskiftini í gamla Grikkalandi. Býir sum Athen høvdu ikki nógv fleiri fólk enn Føroyar hava í dag, men gjørdust kortini ríkir í valdi og vælferð og slóðbrótandi á so mongum økjum.

Hvat var tað tá, sum gjørdi at griksku smálondini megnaðu at laga seg til skiftandi tíðir, síggja broytingar sum abjóðingar heldur enn hóttanir og at skipa seg væl bæði inneftir og úteftir?

Jú, tað var dialogurin, kjakið, tann almenna debattin, har øll hvødu eina rødd, og embætismenn noyddust at grundgeva alment fyri sínum loysnum, og har hugskot brýndust í kjakandi meldrinum.

Tilvildin kann gera sítt, summi lond eru vælsignað við einstaklingum, ið frá forsjónini hava fingið fleiri talentir enn onnur; men tað kann ikki bert vera tilvild, at Athen fostraði Sokrates, Platon og Aristoteles hvønn eftir annan umframt so mangar aðrar. Heldur var tað umhvørvið við kjaki, útbúgving og fólkaræði, ið lat teir sleppa at mennast.

Var samfelagið minni ment, vóru teir kanska noyddir at gera okkurt annað enn at analysera og kjakast. Var samfelagið meiri afturlatið, høvdu teir ongantíð skrivað tankar sínar niður og útgivið teir, men heldur hildið seg og tankar sínar innandura í embætishallum.

Ikki tí, Athen hevði sínar feilir. Vit kunnu í dag harmast um, at kvinnurnar ikki sluppu framat - hvør veit um ikki enn størri verk tá vórðu skrivaði? - Og Athen slapp tá kanska undan ov nógvum almennum prestisjubyggjaríi og ov nógvum kríggi?

Men lat tað liggja nú. Eftir stendur, at lítið land saktans kann megna at hava somu funksjónir sum stór lond, og enntá gera skipanir, sum í øldir fara at finna virðing og undran hjá øðrum og størri londum.

Kjakið í Sosialinum kann kanska ikki enn metast saman við torgið í Athen, men tað er okkurt mennandi og spennadi við einum blaði, sum bæði vil upplýsa við tíðindum, ítrótti, persónslýsingum og skipa fyri debatt - nú eisini Trapputingi - har gløgg høvd eins væl og fólk við prógvi frá lívsins skúla, kunnu kjakast og geva almenningi innlit. Fyrsta bókin við greinum av Tinghelluni ber boð um hetta, og vit kunnu bert gleða okkum, um henda bók verður afturvendandi siðvenja.



*Kári á Rógvi, tá bókin, Tinghellan, varð framløgd í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

Tá fornfrøðingar einaferð fara at kanna, hví Føroyar vóru so dynamiskt og væl tillagað samfelag í 21. øld, fara teir helst at siga, at millum orsøkirnar var tað akademiið, tað umhvørvið við upplýsing og kjaki, sum Sosialurin og Jan Müller skapaðu.

Tillukku tit øll somul á Sosialinum við nýggja miðlahúsinum!